

*– Eg eri fegin um, at kommunurnar tóku undir við ætlanini, tí hetta er rættiliga grundleggjandi fyri Suðuroy, sigur Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri*

# Suðuroyingar samdir um stórfingna menningarætlan

**Allar sjey kommunurnar eru samdar um at lata serfrøðingar gera eina umfatandi vakstraravtalu fyri Suðuroynna. Men tað er ein treyt at Landsstýrið betalir ein part av tí, sum ætlanin kostar at gera**

VAKSTRARAVTALA FYRI SUÐUROY

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er líkt til at farast kann undir eina umfatandi menningarætlan fyri alla Suðuroynna.

Allar kommunurnar í oynni eru samdar um at biðja búskaparfrøðingin, Magna Laksáfoss og samfelagsfrøðingin, Jógvan Mørkøre, um at standa fyri arbeiðnum at fyrireika eini slíkari ætlan.

At kalla tað menningarætlan er kanska ikki heilt rætt, tí tað, sum ætlanin er at gera, er ein vakstraravtala fyri Suðuroynna, har allir partar gera eina avtalu um, hvussu oyggin skal mennast.

Teir báðir serfrøðingarnir vóru í Suðuroy herfyri, har teir greiddu kommununum frá, hvat ein slík vakstraravtala snyr seg um, hvussu farast kann fram hereftir.

Teir boðaðu eisini frá, at semjast kommunurnar um at fara undir arbeiðið, eru teir eisini sinnaðir til at standa fyri arbeiðnum at fyrireika eina slíka vakstraravtalu og at gera eitt uppskot til eina slíka avtalu.

– Hesar seinastu dagarnar hava sjey kommunurnar í oynni viðgera málið fyri at vita um hetta er nakað at fara víðari við, sigur Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri, sum er talsmaður hjá kommununum í hesum máli.

Hann sigur, at nú eru boð komin frá øllum kommununum um, at tær eru sinnaðar at vera við í arbeiðnum.

### Kostar eina hálva millión

Ein slík vakstraravtala er mett at kosta 500.000 krónur og tað er lagt upp til at kommunurnar skulu betala helvtina og landskassin hina helvtina, tí kommunurnar megna ikki at gera tað einsamallar.

Nú kommunurnar hava tikið avgerð um at vera við í ætlanini og at betala sína helvt, verður farið til Landsstýrið við eini umsókn um at betala hina helvtina.

– Sostatt liggur bólturin nú í Tinganesi og støðan hjá landsstýrinum verður avgerandi fyri um hendan ætlanin kann setast í verk.

Men Eli Frederiksen væntar ikki, at tað verður nakar trupulleiki, tí tá ið kommunurnar hava víst ein vilja, heldur hann at tað er sjálvsagt, at Lansstýrið eisini er við.

Hann er fegin um at kommunurnar samdust um at gera eina slíka vakstraravtalu

– Hetta kann vera byrjanin til eitt ávíst samstarv ímillum kommunurnar. Hinvegin vil eg siga, at kundu kommunurnar ikki samstarva um hetta, kundu tær ikki samstarva um nakað, tú hetta er eitt rættiliga grundleggjandi tiltak fyri alla Suðuroy.

Nú eru vágbingar eisini í ferð við eina menningarætlan fyri Vág. Koma hesar báðar ætlanirnar at vera í vegin fyri hvørjum øðrum?

Tað meti eg heilt avgjørt ikki. Eg meti tvørturímóti, at tað er bara positivt at ein menningarætlan eisini verður gjørd fyri Vág, tí tað er onki sum forðar fyri, at ein menningarætlan fyri Vág og ein vakstraravtala fyri alla Suðuroy kunnu ganga hond í hond og kunnu samansjóðast, sigur Eli Frederiksen.

# Ein avtala ímillum allar partar um at menna Suðuroy

**Ì Eyafjarðarætlanini í Íslandi hava tey lagt dent á at menna seg á fýra økjum**

VAKSTRARAVTALA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vakstraravtalan, sum nú er í umbúna at gera fyri Suðuroy, verður gjørd við fyrimynd í

Eyafjarðaravtaluni, sum fevnir um ein part av Norðurlandinum í Íslandi.

Har eru Vinnumálaráðið, Akureyrar Kommuna, Eyafjarða Ídnaðarmenningarfelag, Bygdastofnun, Hægri háskúlin í Akureyri, Ídnaðarmenningarstovnurin, Eyafjarðar Samstarvsfelag, Norðurlands Búskaparvirksemisstovan, fakfeløg í økinum og Útflutningsráð Íslands, gingin saman um avtalu fyri fýra ár um at menna økið.

### Menna seg í fýra tyssum

Í Eyafjarðarætlanini er avrátt, at savna orkuna um at menna seg í fýra tyssum, útbúgving og gransking, heilsuarbeiði, ferðavinnu og matframleiðslu.

– Endamálið við eini slíkari ætlan er, at økið skal aftur gerast eitt áhugavert búsetingaralternativ til høvuðsstaðarøkið og íbúgvatalið skal fáast at vaksa aftur. Samstundis skal kappingarførið betrast, so vøkstur aftur fæst í búskapin, arbeiðsmegin skal mennast og økjast skal um virki og størv í kappingargreinum, dentur skal leggjast á altjóða verkætlanir og at fáa útlendskar íløgur og vitan til økið, søgdu Magni Laksáfoss og Jógvan Mørkøre, táið teir løgdu ætlanina fram fyri kommununum í Suðuroy

Og teir mæla til, at miðja verður beinleiðis fram ímóti at gera eina líknandi avtalu fyri Suðuroy.

Uppgávan verður, saman við pørtunum í ætlaðu avtaluni, at finna fram til tey tyssi, ið skulu verða hornasteinar undir framtíðar menning í Suðuroy.

Teir siga, at tað fer at krevja eitt kanningararbeiði, ið fevnir um møguleikar, royndir aðrastaðni, rákið í vinnugreinum globalt og útbúgvingartørv og tað verður eisini neyðugt at fáa altjóða og heimliga serfrøði uppí hetta arbeiði.

Meiri fæst at vita um Eyafjarðarætlanina á alnetinum á www.calculus.is

## DØMI UM TYSSI

Tá ið magni Laksáfoss og Jógvan Mørkøre vóru í Suðuroy herfyri og greiddi frá eini vakstraravtalu, nevndu teir eisini nøkur dømi um, hvørja mennugreinar, ella tyssi, sum tað kann umhugsast at leggja dent á í Suðuroy. Teir nevndu eisini nakrir trupulleikar, sum gera um seg í Suðuroy

Í tí sambandi nevndu teir millum annað:

**Møgulig tyssi**
Fiskivinnu
Alivinnu
Sjóvinnutænastur
Ferðavinnu
KT-vinnu
(sum partur av øðrum vinnum)

**Ferðavinnan - kampagna**
Kampagna rættað móti føroyingum "Upplivi Suðuroynna"
Fáa "norðoyingar" til at senda fólk suður

**Ferðavinnan - menning**
Gastronomiskt institut
Fleiri tilboð
Hestaríðing
rógva við árabáti, kano ella kajak
GPS-renningar
Gistingarmøguleikar
Tjald, Ból og Biti, tjalding, hús

**Aðrir trupulleikar**
Ov fáar og lítlar avleiddar vinnur
handilsvinna
bilverkstøð
elektrikkarar
timburmenn
málarar

**Orsøkin til trupulleikarnar**
Ov stór sveiggj eru í inntøkunum í Suðuroy
Ringt at fáa støðugar inntøkur

**Møguligar loysnir**
Fjølbroytt vinnulív
fleiri tyssi
fleiri almenn størv

**Møgulig almenn størv**
Ellisheim
Eftirskúli
Gastronomiskt institut
Fongsul ?
Útbúgving og gransking
Heilsuarbeiði
Ferðavinna
Matframleiðsla